ÚTBJÓÐING

## Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið viðvíkjandi gerð av farmahøll við Krambatanga í Trongisvági boðið út alment í total-entreprisu.

Arbeiðið umfatar eina umleið 250 m2 stóra goymsluhøll umframt hølir til ymsar tænastur. Bygningurin verður bygdur á havnarøkinum við nýggju samferðsluhavnina í Trongisvági.

Lisitasjónin verður 2. mai 2006.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá Landsverki í seinasta lagi 17. mars 2006 á telefon 540 852.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar mánadagin **20. marts kl. 17.00**

Teoriskeiðið til lastbil og trailara, byrjar mánadagin **20. marts kl. 19.30**

Teoriskeið til motorsúkklu byrjar týsdagin **21. marts kl. 19.30**

SISERO 351800

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

Jekaragøta 10 • Tórshavn



# Skrivstovufólk til Gøtu Kommunu

Søkt verður eftir skrivstovufólk til kommunu-skrivstovuna í Gøtu, at byrja skjótast tilber.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- ábyrgd av roknskapinum hjá kommununi
- at føra dagliga bókhaldið
- stýring av debitorum og kreditorum
- journalisering
- fólkayvirlit
- aðrar fyrifallandi uppgávur

**Útbúgving v.m.:**
- viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til teldutøkni

**Persónligir eginleikar:**
Vit vænta at tann, ið sett/ur verður,
- er ágrýtin og kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur lætt at samskifta við onnur
- hevur góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti:**
- talan er um fulltíðarstarv
- løn og setanarviðruskifti annars eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Tann, ið sett/ur verður, má kunna tola, at møguligar broytingar í bygnaðinum hjá kommununi verða gjøgnumførdar, eisini um hesar hava við sær eitt broytt starvsøkið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 44 10 12, ella borgarstjóran á tlf. 21 29 12.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2006, kl. 12.00.

Götu Kommuna

Tlf. 44 10 12 · Fax 44 17 74 · www.gota.fo
Við Gjónna 2 · Postboks 40 · FO-510 Gøta

*Hjá kommununi starvast í løtuni 3 skrivstovufólk fulla tíð. Harafturat eru 2 fólk innan teknisku umsitingina knýtt at kommunuskrivstovuni. Bókhaldið hjá kommununi fevnir um allar stovnar undir kommununi, herundir eisini lønarútgjaldingar v.m.*



Havnar SJÚKRAKASSI

# Umboðsráðsval

verður hósdagin 16. mars 2006 kl. 9.00 til kl. 18.00.

Hesi valevnir eru uppstillað til umboðsráðið hósdagin 16. mars 2006:

**Tórshavnar valdømi:**
Jákup Danielsen, Velbastaðvegur 50, Tórshavn *)
Julietta Hansen, Varðabyrgi 34, Tórshavn
Margretha Næs, Jústsgøta 2, Tórshavn *)
Solveig Sørensen, Stoffalág 40, Tórshavn *)
Ann Østerø, Rasmusargøta 9, Tórshavn

**Nólsoyar valdømi:**
Anna Marna Holm, Nólsoy *)
Torbjørg Jacobsen, Nólsoy

Teir persónar, sum eru merktir við »*)« eru umboðsráðslimir, sum hava sitið farna skeiðið.

**Havnar Sjúkrakassi**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 48,**
P/F Auto, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
18.10.2005
**Partapeningur:**
Lækking viðtikin 18.10.2005, við kr. 92.500,00 til kr. 782.400,00 til kurs 100, er nú endalig.
**Kapitalur:**
Kr. 782.400,00

*Skráseting Føroya tann 09. mars 2006*

*Kristin Balle*




## Reingerðarfólk
**til posthúsið í Saltangará**

Søkt verður eftir einum reingerðarfólki til posthúsið í Saltangará at byrja skjótast møguligt.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna mánadag til fríggjadag.

Nærri upplýsingar eru at fáa frá posthúsleiðaranum.

**Løn:** Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Skrivlig umsókn verður í seinasta lagi 24. mars 2006 at senda til

Posthúsleiðaran
Posthúsið
600 Saltangará

Postverk Føroya


# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Skála bygd

Næsti útskiftingarfundur verður mikudagin 15. mars 2006 kl. 11.00 í gamla skúla í Skálafirði.

Útskifting av matr. nr. 539, Skálafjall Miðjan, og matr. nr. 541a, Skálafjall Ytripartur, Skála bygd, verður endað.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útsk. form.


**Norðoya Røktarheim**
700 Klaksvík

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til heimið frá 1. juni til 31. august 2006. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatión, verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 7. apríl 2006.